

www.oljan.fo

**Jan Müller** 06 - 10 - 2012

# Russiska oljuævintýrið nærkast endanum

Í fleiri ár hevur Russland havt stórt avlop á handilsjavnanum orsakað av tí stóra oljuútflutninginum, og tí hava kreppur aðrastaðni ikki havt so stóra ávirkan á tann russiska búskapin. Men nú skrivar russiski tjóðbankin í einari frágreiðing, at avlopið á handilsjavnanum hvørvur longu í 2015, tí tá fer innflutningurin upp um útflutningin. Russiski tjóðbankin væntar, at avlopið á handilsjavnanum verður 79,9 milliardir dollarar í ár, men bara 25,2 milliardir dollarar í 2013. Í 2015 verður hallið ætlandi umleið 8,8 milliardir dollarar, sigur bankin í frágreiðingini. Tjóðbankin sigur, at russiskir politikarar fáa nakað at hugsa um, tá teir skulu venja seg við tann veruleika, at bæði fíggjarlógin og handilsjavnin hava hall. ?

